Skrá

# Mentanarnáttin

2. juni 2023

Visit Tórshavn

# Vælkomin á Mentanarnátt 2023

Klokkan 18.00 verður Mentanar-náttin sett í Vágsbotni. Hansina Iversen heldur setanarrøðuna og Havnar Hornorkestur spælir.

**Hjartaliga vælkomin øll somul.**

Nærri kunning á visittorshavn.fo
og á facebook.com/mentanarnattin

08.00-23.00

## Mariukirkjan

**Varðagøta**

Mariukirkjan er opin.

09.00-17.00

## Norðurlandahúsið

**Norðari Ringvegur 14**

16.00 Fernisering: Summarframsýningin 2023.

Outi Pieski: "Rematriation of a Ládjogahpir – Return to Máttaráhkká" (FI).

09.00-20.00

## Steinprent

**Skálatrøð**

"Purple Rain" Málningaframsýning við Hansinu Iversen.

Øll eru vælkomin at støkka inn á gólvið at síggja framsýningina og verkstaðið.

09.00-20.00

## Býarbókasavnið

**N. Finsensgøta 7**

Bókavørðar vísa runt og kunna um møguleikar og tænastur á Býarbókasavninum.

Havnarmyndir eftir Janus D. Guttesen verða sýndar fram á veghæddini.

17.00 Útgávutiltak: Nýtt yrkingasavn eftir Kim Simonsen.

**09.00-00.00**

## Paname Café

**Vaglið 4**

Paname Café fyllir 6 ár.

17.00 Fimmari við Trygva í bakgarðinum.

**10.00-17.45**

## Tjóðpallur Føroya

**Tórsgøta 9**

Dansiworkshops fyri ymiskum aldursbólkum við Dianu Jógvansdóttir.

**Børn 5-8ár**
10.00-10.30 og 10.45-11.15.
Neyðugt við tilmelding á info@tjodpallur.fo

**Børn 9-12**
11.30-12.00 og 12.15-12.45.
Neyðugt við tilmelding á info@tjodpallur.fo

**Ung 13+**
17.00-17.45

**10.00-18.00**

# Tjóðsavnið

**Brekkutún 6**

16.00 Serframsýningin "Í skugganum" letur upp. Søgan um fyrstu kvinnuligu fotografarnar úr Danmark, Íslandi og Føroyum. Kvinnurnar arbeiddu sum sjálvstøðugir fotografar ymisk tíðarskeið frá 1872 til 1925. Framsýningin vísir á flogið og sjónarringin, sum tær høvdu, tá ið tær fingust við pallsetan, skjalfestan, tað estetiska og tað tøkniliga.

Savnið bjóðar okkurt gott og greitt verður frá um framsýningina. Tiltakið er alment og ókeypis.

15.00-18.00

Gartnarin er í urtagarðinum.

Til sølu: Leggstutt fransagras, Primula vulgaris, sum fyrr vaks í Traðarhamri á Sandi.

Í mesta lagi tvær plantur til hvønn.

Eisini ber til at keypa aðrar prýðisplantur og nakrar gagnplantur.

10.00-18.00

Hoyvíksgarður letur upp.

**10.00-20.00**

## Østrøm

**Skálatrøð 18**

19.00 Kórið Silvitni syngur.

**10.00-23.00**

## TUTL

**Glade Hjørn**

16.30 Gruppo del Maggio delle Ragazze di Riolunato (IT) framføra.

21.00 Føroyskur dansur við Havnar Dansifelag.

23.15 Marianna Winther framførir uttanfyri Tutl.

00.00 Joe and The Shitboys framføra uttanfyri Tutl.

Ókeypis atgongd.

**10.00-23.00**

## Marjun Heimá

**N. Finsensgøta 14**

Nýggja mynstrið "Summarflora" til fyriklæði og turriklæði verður avdúkað.

Hendan dag fært tú átekning av hesum mynstri til sett fyri hálvan prís.

11.00-18.00

# Listasavn Føroya

**Oman Viðarlund**

17.00 Familjurundvísing í serframsýningini "Myndir í trúnni" (uml. 30 min.). Ókeypis atgongd allan dagin og góð tilboð í handlinum.

Kafe list hevur somuleiðis opið frá kl. 11.00 til 18.00.

11.30-00.00

# Suppugarðurin

**N. Finsensgøta 12**

21.00 Livandi tónleikur við Aggrasoppum. Ein blómu-punk/øksumordarapopp-bólkur, sum er kendur fyri sínar kaotisku og óforútsigiligu framførslur.

12.00-20.00

# Gróðurstøðin í Hoydølum

**Hvítanesvegur**

Opið hús og framsýning av urtagarðinum við meir enn 50 etandi plantum.

12.00-19.00 Træeyðkennis-kapping fyri børn í øllum aldri. Eisini verður hugni við báli og sneisabreyði.

17.00 Áhugaverd rundsýning og frágreiðing um framleiðsluna og royndarvirksemið á Gróðurstøðini.

13.30-21.00

## Endurnýtsluhandilin hjá Reyða Krossi

**Bryggjubakki 10**

Handilin hevur opið. Nógv lekkur klæðir, heitt kaffi og heimabakað afturvið.

Ger kvettið, samstundis sum tú stuðlar einum góðum endamáli.

14.00-17.00

## Lítliskúli

**Hoyvíksvegur 56b**

Loppumarknaður, sjónleikur, tónleikur, opin verkstøð, sølubúð og kafé.

Øll eru vælkomin.

14.00-21.00

## Tórshavnar Musikkskúli

**Landavegur 84**

Musikkskúlafestivalur.

Bólkar úr fleiri Musikkskúlum kring landið luttaka. Framførslur verða á útipalli, í Tinnuni og í Hátúni.

16.00-18.00

## Albert Hall

**Kvíggjartún 1**

Vælkomin í Maxim í Albert Hall.

Gjaldstovan, Hagstovan og Landsbankin, sum øll húsast í Albert Hall, bjóða øllum at vera vælkomin í tiltiknu matstovuna Maxim.

Fá tær ein heitan appelsinfrían drekkamunn og okkurt søtt afturvið.

16.00-19.00

## Gallarí Williamsstova

**N. Finsensgøta 16 kj.**

Mentanarnáttlist. Listaframsýing við listakvinnunum Marjun J. Hentze og Ivonnu A. S. Johansen.

16.00-21.00

## Hotel Brandan

**Oknarvegur 2**

16.00-20.00

Terrassan letur upp.

Tilboð á terrassuni: 3 sløg av sliders og eina øl/sodavatn fyri 150 kr. pr. persón.

Livandi tónleikur við Fríða Sigmundsson.

17.30-21.00

Húsagarður letur upp.

## 16.00-21.00

# ListGrafFo

**Tróndargøta 44**

Opið hús í grafiska verkstaðnum hjá ListGraFo í Finsen, har høvi er at síggja verkstaðin og verk hjá listafólkunum, sum øll arbeiða á hvør sín persónliga hátt.

Tey vitjandi kunnu práta við listafólkini um listagrafikk og ta ymsu tøknina.

## 16.00-01.00

# Hilton Garden Inn

**Staravegur 13**

Kokkteylkvøld í nýggju barrini hjá Hilton Garden Inn, har Carla Schack frá heimskenda DJ settinum Batukizer fer at diska heitar, brasilskar vinyltónar frá 60'unum, 80'unum, nú'inum og framtíðini. Umframt eitt nýtt navn, fer barrin at bjóða bíligar kokkteylar frá nýggju barrskránni.

## 16.30-21.00

# LÍV

**Kopargøta 1**

16.00 LÍV-garðurin letur upp, opið er til kl 21.

Í garðinum verður m.a. rørsluveiða, fiskibrunnur, gullgraving og vindmyllur til børnini. Ábit verður at fáa frá 17.00-19.00.

17.00 Klovnurin Bubu.

17.00 Ábit frá 17.00 til 19.00.

19.00 Lena Anderssen og Niclas.

20.00 Hallur Joesen við bólki

21.00 LÍV-garðurin letur aftur

Vinnarin av rørsluveiðuni verður kunngjørdur á sosialu miðlunum.

Øll eru vælkomin.

**16.30-22.30**

## Saunagos

### Yviri við Strond 20

VíkingaGos á Kampingplássinum.

Njót vælveru fyri likam og sál.

Les meira og bílegg tíð á saunagos.fo.

**17.00-20.00**

## Politistøðin

### Húsagøta 3

Politiið skipar fyri tiltaki á parkeringsøkinum uttanfyri politistøðina, har høvi verður at síggja okkara politibilar, bát og motorsúkklur. Kaffi/saft við onkrum góðum afturvið verður at fáa í kantinuni.

19.00 Í kantinuni fara tveir politistar at greiða frá politiarbeiðnum og politiútbúgvingini. Har verða vístar myndir/filmsupptøkur, útgerð/vápn, uniformar og har verður høvið til at fáa eitt prát við politistarnar aftaná.

Samstundis verður eisini møguleiki fyri at royna onkrar av teimum fysisku royndunum, sum eru til upptøkuroyndina til politiskúlan.

## 17.00-20.00

# Arktisk Kommando, Færøerne

**Tórshavnar havn**

Vaktarskipið Hvidbjørnen, ið liggur við Bursatanga, hevur opið skip.

Fyrivarni verður tikið fyri avlýsing.

## 17.00- 20.00

# Landssjúkrahúsið

**J.C. Svabosgøta**

17.00-19.00

Bamsuskaðastova

Læknar og sjúkrarøktarfrøðingar standa klár at taka ímóti sjúkum bamsum. Børnini hjálpa við at finna diagnosu og viðgera sjúklingin. Í bíðitíðini ber til at tekna okkum eina tekning, sum kann lýsa sjúkrahúsvirksemið. Eftirfylgjandi verður framsýning í forhøllini í nakrar dagar. Frammanfyri høvuðsdyrnar standa sjúkrabilar, sum børn og bamsur kunnu vitja.

18.00-19.00

Gongutúrur í tunlinum og Krígshospitalið.

Byrjað verður við Eirargarð 13, Fyrisitingar-bygningurin. Gingið verður í tunlinum undir Eirargarði og víðari undir J.C. Svabosgøtu oman í grøna bygningin.

Á vegnum verður steðgað og greitt frá, har Krígshospital ætlandi skuldi vera undir kalda krígnum. Túrurin er áleið 1 km langur og tekur uml. 20 min.

18.00-20.00

Njót útsýnið av takinum á grøna bygninginum.

Frá forhøllini verður møguleiki at ganga tey 164 trapputrinini upp á ovastu hædd og út á takið at njóta útsýnið yvir høvuðsstaðin.

17.00-21.00

## Føroya Sjósavn

**Rættargøta 1, Argir**

Framsýningin er opin. Hálvt atgongugjald, vaksin 20 kr. og børn 10 kr.

17.00-21.00

## AFS Føroyar

**Dr. Jakobsens gøta 16**

Vitja okkum í hølunum hjá 62N Hotel, og fá eitt prát um hvussu tað er at vera vertsfamilja hjá einum skiftisnæmingi, og hoyr eisini um hvussu lívið, sum skiftisnæmingur er.

Kaffi/te og okkurt afturvið verður at fáa. Øll eru vælkomin.

17.00-21.00

# Tinghúsgarðurin

**N. Finsensgøta**

Møtið Stuðulsfelagnum Víkingabygd og hoyrið um tiltakið Festívalhöll og fyribils ætlanirnar um bygging av føroyskari víkingabygd. Víkingar frá Viking Events og Berserk hava søluframsýning.

17.00-22.00

# Gallarí Havnará

**Havnará 3**

Framsýning við verkum eftir Zacharias Heinesen.

17.00 Fernisering.

17.00-00.00

# Bojsensgarður

Gamli urtagarðurin aftan fyri H.N. Jacobsens Bókahandil er opin.

19.00 Havnarkórið syngur undir leiðslu av Leif Hansen.

20.00 Kórið Glymur syngur undir leiðslu av Hans Olivuri Joensen.

17.00-00.00

## Myndaboks

**Tórsgøta**

Uttanfyri ber til at fáa eitt minni heim við frá Mentanarnáttini 2023.

Inni verður myndasýning við brúðarmyndum gjøgnum tíðina.

17.00-03.45

## Loca

**Sverrisgøta 15**

Thai serrættur. Djúpstokt thai-marinerað høsnakjøt í pancho-raspi, jasminrís og thai bbq-sós.

17.00-04.00

## Sirkus Føroyar

**Grím Kambansgøta 2**

23.00 Bjørn Hentze Bech er DJ – Serliga føroyskan, men eisini útlendskan pop og vintage rock frá 50'unum upp til 70'ini.

17.00-04.00

## Niðri Undir

**Tórsgøta 11**

22.00 Framførsla við Gruppo del Maggio delle Ragazze di Riolunato (IT).

00.00 Helgi og Búi eru DJs - Eitt KVIR tiltak við feitum disco, techno og elektroniskum tónleiki.

Ókeypis atgongd.

17.00-04.00

## Essabarr

**Áarvegur 7**

20.00 Livandi tónleikur við Eyðuni Nolsøe.

23.00 Livandi tónleikur við Jens Marna Hansen.

Ókeypis atgongd.

17.15

## Felagið Tórshavn

**Gongubólkurin**

Spákað verður eftir vegnum Yviri við Strond heim í býin til setanina kl. 18. Byrjað verður uttanfyri kamping-plássið.

Tilmelding ikki neyðug. Øll eru vælkomin.

17.30-22.00

## Hotel Hafnia

**Áarvegur 8**

Summarmatstovan Bistro á 1. hædd letur upp.

Rættirnir eru við íblástri frá klassiska franska køkinum, settir saman við norðurlendskum rávørum.

17.00-04.00

## Blábar

**N. Finsensgøta 23**

22.00 Livandi tónleikur við Una Debess.

Ókeypis atgongd.

18.00

## Vágsbotnur

Mentanarnáttin verður sett. Hansina Iversen heldur setanarrøðuna og Havnar Hornorkestur spælir.

18.00-21.00

## Føroya Rættur

**C. Pløyensgøta**

18.00 Opið á Dómaraskrivstovuni.

19.00 Pallsettur rættarfundur – kom og royn teg sum dómsfólk.

21.00 Húsið letur aftur.

Umframt pallsetta rættarfundin, er møguleiki at síggja almennu hølini hjá okkum.

Møguleiki verður at fáa kaffi/te og smákøkur. Verið vælkomin.

18.00

## Rithøvundafelagið

**undir Pisuvarða 2**

Opið hús í Hans Andriasar húsi.

22.00 Rithøvundar lesa upp, og pallurin verður opin hjá einum og hvørjum at lesa upp egnar tekstir, í mesta lagi 5 min. í part.

18.00-22.00

## Tórshavnar Kommuna

**Vaglið**

Ráðhúsið og Býráðssalurin eru opin.

18.00-22.00

## Tórshavnar Móttøkuhús og Myndasavn

**Tróndargøta**

Høvi verður at síggja spennandi listasavnið hjá Tórshavnar kommunu.

**18.00-22.00**

## Rib62

**Vágsbotnur**

Rib62 bjóðar vælumtóktu túrarnar út á Borðuna, Nólsoy.

Ferðaseðlar fáast til keyps á rib62.com

**18.00-22.00**

## Listahøllin í Finsen

**Tróndargøta**

Listafólkini í Finsen bjóða til opið hús. Støkk innum og fá innlit í virksemið hjá listafólkunum í Listahøllini, ið nú hevur virkað síðani 2019. Okkurt gott til góman verður eisini at fáa. Øll eru hjartaliga vælkomin. Vinarliga - Bárður Dal Christiansen - Súsan í Jákupsstovu - Ole Wich - Durita Jógvansdóttir Thomsen - Samal Blak - Maibritt Marjunardóttir - Jóna Holm Kristoffersen - Jón Sonni Jensen - Turið Maria Jóhansdóttir - Elisabeth Skarðhamar Olsen - Anna Maria Dam Ziska - Laura Vinther - Ása Andreasen - Anna Tórunn á Stongunum - Kirstin Helgadóttir.

**18.00-22.00**

## Tórshavnar Sløkkilið

**Bursatangi**

Tórshavnar Sløkkilið er á Bursatanga.

Brandbilar og amboð verða víst fram.

19.00 Ein eldvenjing.

21.00 Ein bjargingarvenjing.

18.00-22.00

# Ríkisumboðið

**Laðabrekka**

Umframt, at prýðiligi Amtmansgarðurin er opin, verður boðið innar í stovurnar/móttøkustovurnar og skrivstovurnar hjá Ríkisumboðnum.

18.30 Lítlaskúla kórið syngur.

21.00 Kórið XPERIMENT syngur.

21.30 SEV kórið syngur.

18.00-23.00

# Sinnisbati Ung

**Gongugøtan**

Verðin verður skapt av nýggjum hvønn dag, og við tí í huga, verður skaptur ein básur, har latið verður upp fyri sárbæri.

Kom framvið og fá tær ein kaffimun og bláa kaku for when you're feeling blue. Byrja góða kvøldið við einum góðum tanka.

Hála vinin við tær oman á SBU økið og hav eina summar-sárbærasamrøðu um eitt hvørt, har saman verður skapað eitt trygt rúm.

## 18.00-23.00

# Rescue LÍV

**Bursatangi**

Bjargingarbáturin Rescue LÍV verður á Bursatanga. Høvi verður at koma umborð at síggja bátin og bjargingar-útgerðina. Eisini verða vatnskutararnir Rescue EYÐ og Rescue SÁRA á staðnum.

Somuleiðis verður dronan hjá LFB víst fram.

## 18.30-20.00

# Biskupsgarður

**J. Paturssonargøta 20**

Opið hús í Biskupsgarði mitt í býnum. Vitjað hølini, har biskupur og umsitingin hjá fólkakirkjuni halda til.

Í Bispastovuni verður framsýning av bispakápum og prestakjóla. Eisini verður opið út í garðin.

19.00 Gøtu Kirkju Ungdómskór syngur – uttanfyri, um viðrar.

Bjóðað verður kaffi, sunkist til børnini og okkurt leskiligt til góman.

Øll eru hjartaliga vælkomin.

18.30-02.00

## Hollywood

**N. Finsensgøta 20**

18.30-21.30
Hollywood hevur opið hús. Njót ein leskiligan rúsfrían drykk í ungdómshølunum hjá Bláa Krossi Føroya. Ókeypis smakkroyndir.

22.00-02.00
Hollywood opið fyri teimum ungu. Keyp ein rúsfrían drykk, spæl eitt stuttligt spæl afturvið góðum tónleiki, syng saman við vinum ella hugna tær bara í góða huglagnum. Ókeypis rúsfrítt punch.

22.30 Disco Bingo.

23.30 Karaoke/Tónleikur.

19.00-22.00

## Havnar kirkja

19.00 Sanna Bæk Hoydal, sopran, og Ari Hammer Olsen, orgul.

20.00 Tórshavnar Manskór.

21.30 Gospelkórið Brak.

**19.00-22.00**

## KFUK

**Varðagøta 9**

Skipað verður fyri kafé og livandi tónleiki.

19.30 SEV kórið syngur.

20.00 Morgunkórið syngur.

20.30 Kórið XPERIMENT syngur.

20.45 Kórið Brak syngur.

Øll eru vælkomin á kafé.

**19.00-22.00**

## Margarinfabrikkin

**Tórsgøta**

Opið hús.

**19.00-22.00**

## Faroe Ship

**Eystara Bryggja**

Í fótasporunum hjá Kalla Katt og í nýggjum elbussi hjá bussleiðini verður bjóðað forvitnislig rundferð á nýggju Skansabryggjuni.

Nýggja havnarútbyggingin er nú endaliga liðug og vit bjóða áhugaðum at síggja nýggja havnarøkið og tað virksemi, ið fer fram á bryggjuni í løtuni.

Túrurin byrjar við høvuðsskrivstovuna hjá Faroe Ship. Koyrt verður kl. 19 og kl. 20. Avmarkað atgongd. Neyðugt við tilmelding á torsinfo@torshavn.fo.

21.00 Í vetur góvu Vágaverk nýggju plátuna "Ivaveður" út. Nú fara teir báðir Jóan Jakku Guttesen og Sámal Ravnsfjall saman við bólki at framføra í Gráa Pakkhúsi.

Ókeypis atgongd.

19.00-23.00

## Føroya Ellisakfør

**Tórsgøta**

Ellisakførini møtast í hølunum Yviri við Strond 20 og koyra í skipaðum raðfylgjum gjøgnum býin. Ellisakførini savnast síðan í Vágsbotni, har tey verða sýnd fram.

19.15

## Torgið

**Vágsbotnur**

Livandi tónleikur við jazzbólkinum Norðurglóð.

20.00

## Reinsaríið

**Tórsgøta**

Reyn, kæra Reyn.

Sprotin skipar fyri Orðum og tónum. Randi Kúrberg leggur fram bókina "Reyn, kæra Reyn". Ein bók, sum er skipað sum ein gongutúrur við Jørleifi Kúrberg úti á Reyni og í gomlu Havnini.

Við forvitnisligum myndum og smáum søgum greiðir Randi frá, og tá ið tiltakið á Reinsarínum er av, verður farið ein lítlan gongutúr út á Reyn.

Tónleikur er altíð partur av Orðum og tónum, og hesa ferð syngur og spælir Bjarki Hansen.

**20.00 OG 21.00**

## Landsstýrið

**Tinganes**

Rundvísing í gomlu húsunum á Tinganesi. Í ár verður vitjað í Bakkapakkhúsinum, Leigubúðini og í Egholmshúsi. Tiltakið er ókeypis, men tað er avmarkað atgongd.

**21.00-22.00**

## Ebenezer

**N. Finsensgøta**

Konsert við Ebenezerkórinum undir leiðslu av Jens Christiani Guttesen.

**21.00-23.00**

## City Church

**Tróndargøta 36**

Ungdómstiltak við nógvum tónleiki og forvitnisligari churchquiz.Øll eru vælkomin.

22.00

## Trappan

**Vágsbotnur**

Morgunkórið syngur.

22.00-04.00

## Irish Pub

**Gríms Kambansgøta**

24.00 Livandi tónleikur við Charlie George is a Cat.

Ókeypis atgongd.

22.00-04.00

## Dansifrøi

**Gundadalur 7**

22.00 Pub Quiz við Hanusi Johannessen.
Ókeypis atgongd til kl. 00.00.

00.00 Dansur við All That Rain og DJ Cool.

Atgongumerki fáast til keyps á atgongumerki.fo

# Vælkomin á eina spennandi mentanar-ferð gjøgnum havnargøtur

Undirhald, upplivingar og stuttleiki til børn og vaksin. Handlar hava opið til klokkan 23.00

Visit Tórshavn